Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Associated Board próvtøkur á Tórshavnar Musikkskúla

**Fríggjadagin 30. januar fingu 45 næmingar prógv á Tórshavnar Musikkskúla á Frúutrøð. Próvtøkurnar blivu gjørdar í november 2003 saman við einum dómara frá Associated Board í London**

Tórshavnar Musikkskúli hevur nú í nøkur ár skipað fyri póvtøkum, har dómari kemur frá felagsskapinum Associated Board í London í hesum sambandi. Hesaferð vóru próvtøkurnar gjørdar í november í fjør, meðan prógvini blivu handaði seinasta fríggjadag. Vit kunnu leggja afturat at Prince Charles er verndari fyri Associated Board.

Skipanin er bygd upp í átta ymiskum stigum, alt eftir hvussu royndir næmingarnir eru. Tey sum eru komin til stig 8 eru kvalificeraði til at søkja inn á eitt konservatorium.

Næmingarnir skulu hava minst 100 stig fyri at klára royndina, og tað mesta tey kunnu fáa er 150 stig. Miðaltalið fyri hesar próvtøkur um allan heim er 117 stig, men frá Associated Boards verður sagt, at miðaltalið í Føroyum er munandi hægri.



**Klavernæmingar hjá Bjarna Restorff og Jóhs. Andreasen:**
*Aftara røð, frá vinstru: Niklas Mouritsen, Kjartan Nolsøe Jespersen, Ebba Malena D. Thomsen, Hilmar Kass Jacobsen, Jákup Bærentsen*
*Fremra røð, frá vinstru: Claudia R. Jonassen, Bartal A. Hansen, Bjarni Lisberg, Niclas Eysturoy, Rúni Joensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Gittarnæmingar hjá Ólavur Jakobsen og Bo Isholm:**
*Aftara røð, frá vinstru: Alexander Reynheim, Helgi Øster, Karstin E. Jensen, Bjarki Chr. Gram, Brandur Olsen, Bartal Højgaard, Djóni Højgaard*
*Fremra røð, frá vinstru: Jóhannes Jansson, Einar Andreasen, Dánjal Davidsen, Maria Nolsøe, Hilmar Kass Jacobsen, Tróndur Høgnason*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Cellonæmingar hjá Jens Chr. Guttessen og violinnæmingar hjá Sámali Petersen**
*Aftara røð: Cellonæmingar hjá Jens Chr. Guttessen, frá vinstru: Astrid Simonsen, Kristina á Váli, Kjartan Nolsøe Jespersen, Rúni Bláfoss, Anna á Váli Smith, Andreas T. Restorff*
*Fremra røð: Violinnæmingar hjá Sámali Petersen, frá vinstru: Heiðrun Petersen, Durita Askham Sørensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Messingnæmingar hjá Ken Jones og Floytunæmingar hjá Andreu Heindriksdóttir**
*Aftara røð: Messingnæmingar hjá Ken Jones, frá vinstru: Djóni Abrahamsen, Pauli F. Petersen, Heini Andreasen, Niklas Mouritsen, Símun F. Andreasen, Herdis Jakobsen, Tórur Biskopstø Strøm, Karolina Hentze*
*Fremra røð: Floytunæmingar hjá Andreu Heindriksdóttir, frá vinstru:*
*Mia Káradóttir, Bodil M. Hermansen, Erla Helena Petersen, Hallbjørg Haraldsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Diamantbrúdleyp:

## Fía & Jógvan Øregaard

Hendan kavaklædda leygardagin, 5. februar fyri 60 árum síðan, gingu tvey frísk vøkur og glað ungfólk í hjúnalag.

Framtíðin lá ljós fyri framman, hóast myrku skýggini av seinna heimsbardaga lógu yvir Fuglafjørð eins og yvir restini av heiminum.

Tó, hvat var at óttast, tit høvdu hvønn annan, og tit høvdu Hann sum øllum valdar við tykkara lið.

Tit bygdu tykkara heim undir teimum fyritreytum, sum vóru í Føroyum undir seinna veraldarbardaga.

Ikki var tað lætt hjá tær mamma at sita við bangnum hjarta og spyrja; hvat er at frætta frá tí skipi, sum pápi var við?

Nógv ófrættatíðindir hoyrdust. - Hvar mundi skipið hann var við, nú vera?

Mangan hoyrdu vit sum smádreingir og ungir, pápa greiða frá, tá hann saman við øðrum silgdi vandasjógv millum Ísland og Ongland.

Hvussu mamma hansara einaferð sendi boð til Havnar, at hann ikki mátti fara avstað til Onglands, tí einki var frætt frá skipinum, sum elsti bróður tín Jákup Oluf var við.



Tó, tá tað stutt aftaná fréttist, at nú var skipið komið fram, gav hon tær frítt í at velja - og tú fór við til Onglands.

Tríggjar dreingir fingu tit. Í dag kunnu tit gleðast yvir barnabørnini og yvir langommu- og langabbabørnini. Tað er ikki løgið, at tey elska tykkum av heilum hjarta - Hann sum sáar kærleika heystar kærleika.

Nú er lívsólin komin vestur á luftina. Framhaldandi hava tit hvønn annan, og framhaldandi er Hin almáttugi styrki tykkara.

Tit eru fyrimynd fyri eftirkomararnar, tykkara trúfesti móti hvørjum øðrum stendur sum ein varði yvir lívsleið tykkara. Tað er hugtakandi og hjartanemandi at síggja hvussu umsorganin hjá tær mammu er fyri pápa, nú hann ikki longur megnar so nógv, og at síggja ta takksemi sum tú pápi vísir mammu.

Ikki er neyðugt at tala meir – lívsverkið talar.

Vit takka tykkum fyri umsorgan og kærleika, gjøgnum øll hesi mongu árini.

## Jens Klæmint Jacobsen 40 ár



Mánadagin 9. február fyllir Jens Klæmint Jacobsen 40 ár.

Jens Klæmint lærdi sum ungur til snikkara og bleiv seinni útbúgvin byggifrøðingur og hevur saman við Henningi Olsen egna teknistovu í Gøtugjógv -

Jens Klæmint hevur altíð víst serlig evnir, tá ið tað um tekning og list viðvíkur.

Karikaturmyndir hansara eru heilt serligar, og hava tær mangan fingið láturin fram hjá mongum manni.

Men lítilátin sum hann er, hevur hann ongantíð gjørt serliga nógv burturúr hesum evnum.

Men húsini og bygningarnir bera sjónlig boð um ein dugnaligan mann.

Hann er nærlagdur og sera kritiskur í øllum tí hann ger.

Einki fer hálvliðugt úr hansara hondum.

Jens Klæmint er giftur Jonnu og eiga tey 6 gentur.

Sjúka hevði hug at sløkkja lívsneistan í fjør, men tíbetur er hann við at fóta sær aftur.

Takk Jens Klæmint fyri alt tú ert og gevur okkum hvønn dag

Guds signing og góða heilsu framyvir!

Dagurin verður hildin í heiminum í Norðragøtu fríggjadagin 6. februar.

### Dagurin

**5. februar. Ata,** deyð umleið ár 250. Henda vakra unga gentan í Cataniu á Sikiloy vildi ikki lovast heidnum fríggjara, av tí at hon var kristin, og varð eftir ræðuligar pínslur tikin av døgum.

Grikst navn Agata, sum merkir *tann góða.*

# Musisk innrás og listaframsýning



LIST
*Tíðindaskriv*

Leygardagin komandi kl 16 fer Kristina Joensen, listakvinna úr Fuglafirði, at gera eina »musiska« innrás í Mentanarhúsið í Fuglafirði í rørslum, livandi skulpturum, orðum, ljóði og ljósi. Hetta er forvitnisligt. Sigast kann, at hetta er leikur í list, sum er nýskapandi. Ókeypis atgongd.

Fagnaðarløtan varir umleið ein tíma.

Eftir leikin í Mentanarhúsinum letur Kristina upp eina málningaframsýning í Ribarhúsi, ið ber heitið: Silvitnisdáran.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
tá okkara elskaði maður og pápi

**Jóhannis Østerø**
Vágur

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður.

Hjartans tøkk til tykkum øll, bæði nær og fjar,
sum á ymiskan hátt mintust okkum
og vístu honum seinasta heiður.

*Familjunnar vegna*
**Elinborg, Lív og Mona**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, fyri sýnda samkenslu
tá pápi og abbi okkara

**Torbjørn Simonsen**
Tórshavn

andaðist 18. des. og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar, berarar og til tykkum,
ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og fyri hjálp til ervið.
Ein serstøk tøkk til leiðslu og starvsfólk á Lágargarði
fyri tíðina hann var har.

*Familjunnar vegna*
**Deirdre og Símun**